HOFF STOFF

# ið góðum minnum



Tey dansaðu frá borðinum eftir døgverðan í Trongisvági. Frá vinstru eru tey, Mary, Krúnprinsessa, Pauli Einarsson, varaborgarstjóri á Tvøroyri, Anita Eidesgaard, løgmansfrúa og Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum





Konglig vitjan ella ikki-hesin lítli varð móður av hóvastákinum

## Matskrá

Hetta er døgverðin, sum tey kongligu fingu á døgverðanum á Tvøroyri týskvøldið

*Undanrættur:*
*Carpaccio av Havtasku við rukolasalati, fennika og gularótum*
*Vín:Trimbach Riesling Reserve 2002*

*Høvuðsrættur:*
*Sneið av krúnhjørti- og kenguru við pom røsti, innbakaðum soppum, mini squash og vill glace*
*Vín: CSM Elderton 2000*

*Omaná:*
*Mazarin muffin við sjokulátumoussé, fikum og kokus ísi*
*Vín: Botrutis Semillion,Elderton 2003*
*- - -*
*Kaffi/te, avec & petit four*



*Gestirnir standa í gongini og bíða eftir at verða bjóðaðir til borðs*



*Allir gestirnir fara inn í døgverðasalin og standa við stólarnar og bíða, til tey kongligu hava sett seg*



*Limir úr dansifeløgum í Suðuroy skipaðu fyri tí føroyska dansinum*

stjórin teimum kongligu hjartaliga vælkomnum.

Og at suðuroyingar eru serliga kongatrúgvir, lat borgarstjórin ongan iva vera um, tí hann fortaldi teimum, at ímillum manna verður Suðuroyggin eisini oftani nevnd Lítla Danmark.

Hann fortaldi teimum eisini, at uttan kongshúsið var kanska heldur onki Tvøroyri, tí fyrsta hús á Tvøroyri var kongligi úthandilin, sum varð bygdur í 1836.

– Men síðani hevur menningin verið øgilig, segði hann.

Og so fortaldi hann teimum eisini eina stuttliga søgu.

– Tá ið Fríðrikur, krúnprinsur var føddur, útskrivaði eitt danskt vikublað eina kapping, har lesarar vórðu bidnir um at senda inn uppskot um, hvussu krúnprinsurin skuldi alast upp.

Ein av teimum, sum sendu inn, var ein 11 ára gamal tvøradrongur, sum nú er borgarstjóri á Tvøroyri.

Í svari sínum vísti tvøradrongurin á, hvussu fegin børn vóru um at búgva í Føroyum og tí helt at lítli prinsurin átti at sloppið at uppliva Føroyar so ofta sum gjørligt.

Hann helt somuleiðis, at tað var ikki gott at lata prinsin fáa alt, sum hann peikaði á, og hann skuldi heldur ikki hava so nógva leiku, at hann svam í tí, tí so kom at hann ikki at seta prís uppá tað.

Hvussu nógv av ráðunum, kongshjúnini hevði fylgt, visti hann ikki.

À døgverðanum sang Guðrun Sólja Jacobsen og Neil Magnussen spældu gittar og Jens Mortan Mortensen á klaverinum og Oddur Hentze á klarinett spældu eisini.

À døgverðanum fingu tey eisini gávur, sum vóru klæðir frá Pau.